Tíðindi úr Føroyum tann 3. februar 2014

Tíðindi til føroyingar uttanlanda stuðla av tí føroysku sjómanskirkjuni.

---

**Rekur fyri vág og vind í Atlantshavinum** 04. Feb 2014
Farmaskipið Cape Elise hevur rikið fyri vág og vind í Atlantshavinum, síðani motorurin steðgaði um middagsleitið leygardagin. Skipið var tá statt einar 186 fjórðingar úr útsynningshorninum av Írlandi, Slea Head.
Síðani skipið kom í trupulleikar av, at motorurin steðgaði, er tað rikið í ein útnyrðing.
Cape Elise er 174.124 TDW og bygt í 2005. Skipið siglir undir flagginum hjá Marshalloyggjunum og verður rikið av Empire Bulkers ltd í Grikkalandi.
Kelda: Maritime Bulletin
Antares.fo

---

**Sessast aftur við samráðingarborðið í morgin** 04. Feb 2014
Strandalondini sesast í morgin aftur við samráðingarborðið - hesa ferð í London.
Í fyrstu atløgu snúgva samráðingarnar seg um kvotabýtið av svartkjafti og norðsjóvarsild í ár.
Í annaðkvøld kl. 18 verður so eisini farið undir eitt nýtt samráðingarumfar um makrelin.
Hesar samráðingarnar vórðu niðurlagdar í Bergen fríggjadagin. Nú verður London fundarstaðurin fyri einum nýggjum samráðingarumfari.
Leiðarin av samráðingunum, John Spencer, sum eisini er leiðari fyri samráðingarnevndini hjá ES, hevur bundið um heilan fingur við eisini at hava sett hósdagin og fríggjadagin av til samráðingarnar, um tørvur verður á tí.
Antares.fo

---

**Ljós fyri tunnilsmunnan í Miðlahúsinum 5. februar kl. 19** 04.02.2014 - 15:24
Leingi hevur verið arbeitt við Eysturoyar- og Sandoyartunlunum báðum, uttan at nakað ítøkiligt úrslit er rokkið.
Nú er ein semja funnin millum allar flokkar á tingi, ið av álvara skal seta ferð á arbeiðið á tunlarnar.
Hetta er eitt søguligt bragd.
Neyvan nakrantíð áður er so breið og nøktandi semja funnin millum allar flokkar.
Hendan tunnilsloysnin fer at skunda undir menningina av føroyska búskapinum og samfelagnum sum heild.
Okkara oyggjaland verður enn meiri samansjóðað og alfevnt enn higartil til eina fólksliga og búskaparliga eind. Nú verða yvir 90% av Føroyum bundnar saman.
Vit seta við hesum risa átaki hol á sonevndu Suðurleiðina.
Mikukvøldið 5. februar kl. 19 verður tunnilssemjan viðgjørd og lýst í Miðlahúsinum.
Jørgen Niclasen, Landsstýrismaður í Fíggjarmálum, greiður fram tunnilsætlanini og arbeiðinum frameftir.
Alfred Olsen, Høgni Hoydal, Hendrik Old, Jenis av Rana, Poul Michelsen og Kári P. Højgaard siga nøkur orð um tunnilssemjuna.
Evald Kjølbro, stjóri á Landsverki, greiður frá linjuføringum, prísum og ferðslukanningum.
Øll eru vælkomin
Huxa Fólkafloksungdómur og Havnar Framburðsfelag
Nordlysid.fo

---

**Strandalondini skulu finna 0,8%** 04.02.2014 - 16:27
Herluf Sigvaldsen, sum er samráðingarleiðari vegna Føroyar, sigur at samlaða bítið er í løtuni 100,8 %. Sostatt skulu partarnir slaka tilsamans 0,8% tá londini hittast á fundi í London í morgin. Ein møguleiki er at verður semja - letur tað upp fyri eini semju við Norra um fiskiskapin í norska partinum av Barentshavinum tí tann avtalan var uppsøgd av norsku myndugleikunum vísandi til ósemjuna um makrel bíti. Landsstýrismaðurin vantar ikki fulla semju.
- Skal semja finnast mugu allir fýra partarnir slaka krøvini 0,2 % í part. Semja er heldur ikki um TAC-ið ella samlaðu veiðuna. Í øllum føri verður rokna við at heildarkvotan verður hægri enn tey 900.000 tonsini sum ICES hevur mælt til sum hámark. Samráðingarnar eru settar at byrjað kl. 14 og samráðst verður um norðhavssild, makrel og onnur fiskasløg av felags áhugað.
Herluf Sigvaldsen váttar at grundgevingin hjá norrmonnum at uppsiga avtaluna við Føroyar og tveita føroysk skip úr norska partinum av Barentshavinum var ósemja um makrelbýti, men hann vil ikki gera viðmerkingar til støðuna í Barentshavinum. Men sum skilst kemur ein avtala um makrelbýti eisini at ávirka viðurskiftini millum Norra og Føroyar og ferð at gera tað møguligt at fáa eina semju í lag um hendan partin.
Tá Maria Damanaki var í Føroyum segði hon at ES á øðrum økjum eitt nú innan útbúgving var áhugað í at fáa betur samstarv millum Føroyar og ES.
Vantar ikki fulla semju
Jacob Vestergaard sigur at hóast útlit eru fyri at partarnir møguliga kunnu semjast um makrelin í London, so verður neyvan nøkur semja um norðhavssildina.
- Hóast tað verða nógv tøl nevnd í samband við samráðingarnar so eru okkara royndir at tølini broytast nóg hvørjaferð partarnir hittast. Men tað tykist greitt at TAC-ið verður hægri enn tey 900.000 tonsini av sild sum ICES mælir til. Um ein semja um makrelbítið kemur at ávirka aðrar samráðingar er óvist tí eg vanti ikki at vit finna semju í sildatrætuni í London, sigur Jacob Vestergaard.
----
Seinast Føroyar høvdu eina avtalu um makrel við hini strandalondini var føroyski parturin 4,62 % ella 30.000 tons. Av hesum bleiv ein partur brúktur til at bíta um kvotu við onnur lond og restin var bítt einans til nótaskip.
Í 2010 avgjørdu føroyingar at áseta eginkvotu og í fjør fiskaðu føroysk skip 150.000 tons sum svarar til 23%. Undir samráðingunum hava føroyingar heildi fast um 15% av makrelbýtinum og seinast nakað fréttist stóð føroyingum í boði at fáa 11,9 %.
Nordlysid.fo

---

**Politiskt kjak beinleiðis á nordlysid.fo mikukvøldi kl. 19** 04.02.2014 - 18:01
Høgni Hoydal, Hendrik Old, Jørgen Niclasen, Jenis av Rana, Poul Michelsen, Alfred Olsen og Kári P. Højgaard fara í annaðkvøld kl. 19:00 at kjakast um nýggju tunnilsloysnina í Miðlahúsinum og kjakið verður sent beinleiðis her á nordlysid.fo
Nú er ein semja funnin millum allar flokkar á tingi, ið av álvara skal seta ferð á arbeiðið á tunlarnar. Sagt verður at hendan tunnilsloysnin fer at skunda undir menningina av føroyska búskapinum og samfelagnum sum heild. Okkara oyggjaland verður enn meiri samansjóðað og alfevnt enn higartil til eina fólksliga og búskaparliga eind. Nú verða yvir 90% av Føroyum bundnar saman, skriva fyriskiparnir av tiltakinum í miðlahúsinum.
Evald Kjølbro, stjóri á Landsverki, greiður frá linjuføringum, prísum og ferðslukanningum.
Tað er Huxa Fólkafloksungdómur og Havnar Framburðsfelag sum skipa fyri fundinum.
Av tí at allir flokkar lutta í kjakinum hevur Norðlýsið gjørt avtalu um at streama fundin beinleiðis.
Nordlysid.fo

---

**Laudrup fingið sekkin** 04.02.2014 - 20:25
Premier League: Michael er nú fortíð í Premier League. Hann hevur júst nú fingið sekkin eftir 18 mánaðir, sum venjari hjá Swansea. Hetta upplýsir felagið á heimasíðu síni.

Uppsøgnin kemur í kjalarvørrinum av øllum høvuðbrýggjanunum seinastu tíðina um framtíðina hjá Laudrup í felagnum. Eisini eru vánaligu úrslitini seinastu tíðina orsøk til uppsøgnina.
- Tað er við ringum tannabiti, at vit hava tikið hesa avgerð, sigur formaðurin í Swansea, Hugh Jenkins.
- Men tað er ein avgerð, sum kemur at gagna Swansea og áskoðarum okkara, er Hugh Jenkins vísur í.
- Tað er fyrstu ferð í tíggju ár, at felagið ger skilnað við ein venjara á hendan hátt. Men vit vórðu noyddir at gera hetta, fyri at basa ótryggleikanum, ið hevur valdað seinastu tíðina.
Michael Laudrup var í fjør við at vinna ensku Liga Cup, og liðið endaði eisini á einum flottum 10. plássi. Men í ár hevur gingið striltið at liva upp til farna kappingarár.
Swansea er í løtuni í niðurflytingarvanda. Swansea liggur eftir 24 umfør á einum tólvta plássið við 24 stigum; men tað eru bert 2 stig niður til niðurflytingarstrikuna.
Nordlysid.fo

---

**Framgongdin heldur fram: Kommunurnar hava fingið fleiri skattakrónur**
Fyrstu skattatølini hjá TAKS fyri 2014 eru nú tøk. Landskassin fekk í januar mánaði 96,4 milliónir krónur inn í skatti, meðan kommunurnar fingu slakar 110 milliónir krónur. Fyri landið eru inntøkurnar á leið tað sama, sum sama tíðarskeið í fjør, meðan kommunurnar hava fingið nakrar fleiri skattakrónur enn sama tíðarskeið í fjør.
Í januar mánaði 2014 komu eisini 20 milliónir krónur inn í eftirlønarskatti og góðar 3 milliónir í kirkjuskatti. Í eftirlønarskatti og í kirkjuskatti vísir uppgerðin hjá TAKS, at nakað meir av skatti er komin inn enn um sama tíðarskeið í fjør.

Ólavur í Beiti tann 04/02/2014, 14:10

Vp.fo

---

**Enniberg fiskaði fyri 75 milliónir krónur í fjør**
Árið í fjør var gott men tó ikki av teimum bestu, tí prísurin var vánaligur.
Tað sigur Mortan Johannesen, sum nú so smátt er farin at rigga av sum reiðari á einum av bestu fiskiskipunum í Føroyum seinastu 24 árini, við vp.fo.
Enniberg fiskar mest tosk, men eisini nakað av kongafiski, svartkalva og hýsu.
Ætlandi loysir Enniberg seinni í vikuni, tá hann fer at royna nýísetta motorin. Við nýggja motorinum hevur Enniberg fingið 1000 hestar afturat, so hann nú hevur 6.000 hestar á høvuðsmotorinum.
Báðir ljósmotorarnir, sum hvør er 1.500 hestar, kunnu nú koyra inn á skrúvuna, so Enniberg kann sigla heim við hjálp frá ljósmotorunum, hóast høvuðsmotorurin skuldi gingið fyri.
Nýggi motorurin er eisini betri enn gamli, tí hann brúkar minni í olju. Eftir hvat teir hava fingið upplýst, so fer oljunýtslan nú væntandi at minka við 10 prosentum í mun til gamla motorin.
Úrslitið hjá partafelagnum Enniberg seinastu fimm árini hevur svingað millum vinning uppá 10 mió kr og hall uppá 9 mió kr, men reiðaríið er sera væl fyri, tí ongin bankaskuld er og eginpeningurin góðar 140 mió kr.
Um tú veitst okkurt, sum Vágaportalurin ikki veit - skriva so til beiti@kallnet.fo

Gunnar Skúvadal tann 04/02/2014, 20:15

Vp.fo

---

**WHO ávarar: "Flóðalda" av krabbatilburðum hótta jørðina**
Heimurin stendur yvir fyri eini eksplosivari øking av krabbameins tilburðum og tí mugu herdar restriksjónir setast í verk móti alkoholi og sukuri. Tað er ávaringin frá World Health Organization (WHO) í eini nýggjari frágreiðing.

14 milliónir fólk fáa staðfest krabbamein árliga, men WHO spáar, at talið av krabbameinstilburðum verður 24 milliónir um árið í 2035. Men hetta tal kann setast helvtina niður, um álvarsom átøk verður gjørd við herferðum móti royking, fiti og alkoholi.
Longu í 2025 ber WHO ótta fyri, at 19 milliónir fólk fara at fáa tey syrgiligu tíðindini, at tey hava krabbamein.
WHO World Cancer Report 2014 vísur á, at tær mest týðandi keldurnar til at fyribyrgja krabbameini umfata:

• Royking
• Infeksjónir
• Alkohol
• Fiti og inaktivitetur
• Stráling, bæði frá sólini og medisinskari skanning
• Luftdálking og aðrir umhvørvisligir faktorar
• Seinkaður foreldraskapur; at vit fáa færri børn og at mammur ikki geva bróst

Frágreiðingin kann takast niður - trýst her
Um tú veitst okkurt, sum Vágaportalurin ikki veit - skriva so til beiti@kallnet.fo
Ólavur í Beiti tann 04/02/2014, 21:27
Vp.fo

---

Áki Bertholdsen 04.02.2014 (08:22)
**Fer at kosta 10 milliónir at loynilurta eftir fólki**
Tíggju milliónir!
Hetta er upphæddin, tað fer at kosta Føroya Tele og Vodafon at útvega útgerðina, sum krevst fyri at geva løgregluni betri møguleikar at loynilurta eftir fólki.
Samstundis fer tað at kosta 1,7 milliónir í rakstri um árið.
Tað er í sambandi við grov brotsverk, at løgreglan ætlanin er at geva løgregluni betri umstøður at loynilurta eftir fólki.
Eitt uppskot um hetta er í løgtinginum til viðgerar og í næstum fer Johan Dahl, landsstýrismaður í vinnumálum, eisini at leggja uppskot fyri Løgtingið, sum áleggur telefeløgunum at útvega sær neyðugu útgerðina.
Útvega tær báðar telefyritøkurnar sær útgerðina í felag, skulu tær rinda eftir, hvussu stóran marknaðarpart, tær hava.
Tað merkir, at Føroya Tele skal rinda 75 prosent og Vodafon skal rinda 25 prosent.
Men koma fleiri telefyritøkur, skulu tær eisini rinda sín part.
Tað er løgreglan í Føroyum, sum hevur víst á, at hon ikki ikki hevur møguleika at loynilurta eftir fólki í sínum arbeiði, í samband við álvarsom brotsverk, og at hetta í stóran mun tarnar kanningararbeiðinum.
- At loynilurta eftir er fjarskifti er eitt týðandi amboð fyri at verja áhugamál landsins, serliga í sambandi við tryggleika landsins og í sambandi við at avdúka álvarsligar brotsgerðir, sigur Johan Dahl.
Sum støðan er í dag, hevur løgreglan heimild at loynilurta eftir fólki, men ongar treytir fjarskiftislógini, um at veitararnir hava neyðugu útgerðina til taks tøka.
Tað vil siga, at í dag er ósamsvar ímillum heimildirnar hjá løgregluni og treytirnar í fjarskiftislógini.
Og hetta ósamsvar fer at halda fram, hóast uppskotið til broyting í rættargangslógini verður samtykt og fjarskiftislógin verður broytt í tann mun hetta lógaruppskotið leggur upp til, sigur Johan Dahl.
In.fo

---

Áki Bertholdsen 04.02.2014 (11:36)
**Hevur verið heim hjá 2600 fólkum**
Í dag fyri 30 árum síðan, tann 4. februar 1984, varð Eysturoyar Røktar og elllisheim í Runavík alment

tikið í nýtslu.
Thordur Niclasen, fyristøðumaður, sigur, at upprunaliga vóru tað einstaklingar sum slóðaðu fyri og fingu samstarv í lag við Lions Club í Eysturoy, og kommunurnar í Eysturoynni.
- Á vári 1980 gjørdu tey felagsskapin "Eysturoyar Røktar-og ellisheim" og valdu bygginevnd/stýri.
Síðan heimið varð tikið í nýtslu, er tað bygt út tvær ferðir.
Fyrru ferð var í 1992 og seinnu ferð var í 2006.
Sostatt er nú pláss fyri 70 fólkum umframt at 12 fólk í dagtilhaldinum.
Kommunurnar í Eysturoynni hava við hesum lagt stóra orku í og virkað fyri dygdargóðum umstøðum til teirra, ið hava tørv á røktarheimsplássi, sigur Thordur Niclasen.
Og tað er ikki at taka seg aftur í, at heimið hevur havt stóran týdning.
Hesi 30 árini hava út ímóti 2600 fólk búleikast á heiminum í styttri ella longri tíðarskeið, sigur hann.
Hann sigur, at tá ið heimið rundaði tey 25 árini, varð skipað fyri stórum almennum hátíðarhaldi.
Men nú á 30 ára føðingardegnum verður einki alment hátíðarhald.
In.fo

---

Áki Bertholdsen 04.02.2014 (12:04)
**Leggja allar skúlarnar saman**
Frá 2016 skulu skúlabørninini í Sunda Kommunu ganga í skúla á Oyrarbakka.
Tað ætlar kommunustýrið á Sundi.
Tey arbeiða við at broyta skúlabygnaðin í kommununi, og í hesum sambandi hava tey havt fundir í teimum ymsu bygdunum.
Heðin Zachariasen, borgarstjóri, sigur, at fólkið tekur ógvuliga væl undir við ætlanini.
Endamálið er at fara burtur frá teimum gomlu og smáu skúlunum til ein størri nútímans skúladepil, ið ætlandi verður á Oyrarbakka, og sum verður ein felags skúli fyri alla kommununa.
In.fo

---

Áki Bertholdsen 04.02.2014 (13:18)
**Vit skulu skifta kós**
Elektron fer nú at niðurlagað virksemið uttanlands.
Ístaðin skal gongd setast á menningina innanlands.
Tað hevur nevndin í Elektron avgjørt, sigur Suni Schwartz Jacobsen, nevndarformaður.
Nevndarformaðurin tosað við Rás2 á miðdegi, har hann greiddi frá støðuni.
Eitt, Hilmar Jan Hansen á Rás2, spurdi Suna Schwartz Jacobsen um, var, um ikki eigararnir sjálvir, altso bankarnir, høvdu trekt tenninar úr Elektron við at flyta netbankan og teldusamskiftið uttanlands.
In.fo

---

Áki Bertholdsen 04.02.2014 (15:12)
**Nú fóru teir ov langt**
- Nú haldi eg, at bankarnir eru farnir ov langt.
Tað heldur Bárður Nielsen, formaður í fíggjarnevndini hjá Løgtinginum, og fíggjarpolitiskur talsmaður hjá Sambandsflokkinum.
Tað, hann sipar til, er, at BankNordik nú er farin at áleggja summum viðskiftafólkum ómaksgjald, bara fyri at hava kontu í bankanum.
Bárður Nielsen ásannar, at bankarnir hava broytt politikk seinastu árini.
Fyrr livdi bankarnir av muninum ímillum innlánsrentuna og útlánsrentuna.
Men seinastu árini eru teir miðvíst farin at leggja inntøkuna yvir á ómaksgjøld fyri alt handa slag av tænastum, teir veita.
- Men tá ið teir nú eisini fara at krevja gjald frá fólki, bara fyri hava eina kontu, haldi eg, at teir fóru út

um mark, heldur Bárður Nielsen.
- Tað er bæði ósmakligt og óhóskandi, leggur hann afturat.
Hann sigur, at hetta er ein spurningur, politiski myndugleikin eigur at taka upp.
Spurningurin er bara um nakað er at gera, tí hann heldur ikki, at spurningurin er so einfaldur, sum hann ljóðar viðhvørt.
- Vit áleggja øllum føroyingum at hava eina kontu í bankunum í sambandi við lønarflytingar.
Tískil er tað eisini ein spurningur, um vit ikki eisini kunnu áleggja bankunum, at tað skal vera ókeypis at hava eina kontu, leggur hann afturat.
Spurningurin er so bara, um bankarnir ikki bara leggja gjaldið á okkurt annað.
Bàrður Nielsen vísir á, at ein máti kundi verið, at bankarnir fingu kapping, men hann sær ila fyri sær, at tað almenna kundi verið uppi í.
Men hann vísir á, at í Danmark hevur handilssketan Coop gjørt sín egna banka og hann heldur, at kundi talan verði um eina slíka loysn av onkrum slagi í Føroyum, hevði tað verið ein fyrimunur.
- Ber tað til við onkrum slíkum, hevði tað dámt mær betri, tí so kundi skipast so fyri, at fólk kundu fingið sína løn uttan um bankarnar.
- So høvdu bankarnir fingið veruliga kapping og tað hevði dámað mær betri, men spurningurin er, um tað letur seg gera.
Bárður Nielsen vísir á, at Posta hevði giro, men helt uppat. Tað varð ov dýrt av tí at kravið var, at Posta skuldi lúka somu treytir sum bankarnir.
Tí heldur hann, at spurningurin er alt annað enn einfaldur at hava við at gera og nakra skræddaraseymaða loysn, hevur hann ikki.
Men hetta er í øllum førum eitt mál, vit eiga at taka upp, heldur Bárður Nielsen.
In.fo

---

Eyðun Klakstein 04.02.2014 (18:13)
**Slaturbólkar skapa trupulleikar**
Í dag fyllir Facebook 10 ár, og í tí sambandi tosaðu Niels Uni Dam, samskiftifrøðingur, og Janus Hentze í Stórustovu um, hvussu føroyingar duga at brúka Facebook. Hetta var í sendingini "Rás2 Seinnapartur" í gjár.
- Nú fáa vit mest at vita um trupulleikar, sum fólk hava av Facebook, og ein afturvendandi trupulleiki hesa seinastu tíðina hevur verið, at fólk klaga um sonevndar slaturbólkar, har fólk verða hongd út við navni, sigur Janus Hentze í Stórustovu, sum starvast í Dátueftirlitinum.
Niels Uni Dam heldur, at nógv at tí samfelagsliga kjakinum er flutt á Facebook, men tað er ógvuliga misjavnt, hvussu væl tað riggar at kjakast á hendan hátt.
In.fo

---

Leo Poulsen 04.02.2014 (21:10)
**Nógv rúsevnismál á skránni**
Í morgin og alla komandi viku eru hópurin av rúsevnismálum fyri í Føroya Rætti.
Í morgin eru fleiri rúsevnismál á skránni í Føroya Rætti.
Seks fólk eru ákærd nú mikudagin um euforiserende stoffer, meðan bæði í komandi viku og næstu viku aftur eru fleiri mál um ávikavist euforiserende stoffer ella skunk.
Tað er í fleiri førum tey somu ákærdu, sum ganga aftur, og fríggjadagin 14. februar eru tey allarflestu til sama rættarfund.
Tað eru eisini fleiri hassjplantagur avdúkaðar í seinastuni, og tað er helst ein av orsøkunum til mongu rættarmálini um euforiserandi evnir og um skunk.
Spurningurin er so, um ákæruvaldið ynskir at gera revsingina strangari mótvegis teimum, sum hava hassjplantur, ella hesi nógvu rúsevnismálini eru púra tilvildarlig.
Men frá mikudegnum og báðar tær komandi vikurnar standa altso nógv slík mál á rættarlistanum.
In.fo

---

| Føroysk partabrøv | Last | +/- | % |
| --- | --- | --- | --- |
| Atlantic Airways (ICL) | 148,00 | 0,00 | 0,00 |
| Atlantic Airways (COP) | 145,50 | 0,00 | 0,00 |
| Atlantic Petroleum (ICL) | 145,00 | 0,00 | 0,00 |
| Atlantic Petroleum (COP) | 121,50 | -2,00 | -1,61 |
| Bakkafrost (OSL) | 82,32 | 0,00 | 0,00 |
| BankNordik (ICL) | 130,00 | 0,00 | 0,00 |
| BankNordik (COP) | 119,50 | -2,00 | -1,64 |
| Faroe Petroleum (LSE) | 9,77 | -0,16 | -1,59 |

Vmf.fo

---

**Andlát**

Comfort Ama Sewaa Lervig, ættað úr Ghana, búsitandi í Fuglafirði andaðist mánamorgunin 3. februar á Ríkissjúkrahúsinum 48 ára gomul.

---